## Alt fyri hvalin

Formaðurin í umhvørvisfelagsskapinum Sea Shepherd, Paul Watson, skrivar í brævi til formannin í íslendska náttúruverndarsamtakinum, Árna Finnsson, at hann og hansara limir eru til reiðar at lata lív fyri at noyða íslendingar at gevast við at veiða stórhval. Hann skrivar eisini, at hann er eisini til reiðar at fara í fongsul í Íslandi, skuldi tað hent, men hann vissar samstundis íslendingar um, at tað skal ikki fara stillisliga aftur við borðinum.

## Innrás eystaneftir

Tað er ikki bara tann danska byggivinnan, sum fær eysturevropearar í stórum tali at leita sær til Danmarkar at arbeiða. Jyllandsposturin skrivar, at óvanliga nógv fólk úr Eysturevropa hava søkt um at sleppa at arbeiða í Danmark í summar. Tað eru serliga landbúnaðurin og garðyrkisvinnan, sum hava áhuga, og í løtuni hava myndugleikarnir 7.500 umsóknir frá fólki, sum hava hug á teimum yrkisgreinunum. Tey flestu eru úr Póllandi.

# í Vestmanna





*Eftir at bátarnir høvdu lagt til bryggju, varð skipað fyri bjargingarroynd, har nýggi bjargingarbáturin varð royndur*

tónleik og sungu fyri bátafólkinum og øðrum, sum leitaðu sær oman á bryggjuna hesa løtu.

Jóngerð sigur, at sum kvøldið leið, var eisini ein serstakur hugni fram við økinum, har bátarnir lógu.

– Bátafólkini høvdu livandi ljós á bátunum, og tey bjóðaðu umborð til føroyskan mat og kanska okkurt leskandi.

Seinni um kvøldið skipaði Vestmanna kommuna fyri fýrverki, sum eisini eydnaðist væl, hóast tað var heldur ljóst í veðrinum, tá fýrverkið varð skotið.

### Dagurin ásettur

– Vit vóru sera heppin við veðrinum, og tað er so ógvuliga umráðandi, um ein slík stevna skal eydnast til fulnar, sigur forkvinnan í VÍF.

Hon leggur aftrat, at nógv fólk var í Vestmanna, sum leygarkvøldið leið, og í dansinum í ítróttarhøllini um kvøldið og út á náttina var fullsett, 800 fólk. Tað vóru bólkarnir, Thunderbirds og Vestmenn, sum syrgdu fyri tónleikinum og sanginum í ítróttarhøllini.

– Vit fara nú at hyggja at, hvussu bátastevnan hevur vignast, men vit hava longu sett dagin á, tá stevnan verður komandi ár. Stevnudagurin er settur til 24. mai, og vit gleða okkum til at taka táttin uppaftur um eitt ár, sigur ein sera væl nøgd forkvinna í VÍF, Jóngerð Nielsen.



*Sum siður er, fekk bátafólkið heita og vælsmakkandi suppu eftir stævnu ferðina norður á Vestmanna*